SOSIALURIN

Nr. 74 — 21. SEPTEMBER 1966 — 39. ARG.

Landbúnaðurin

DAG

LANDBÚNAÐUR OKKARA LIGGUR Á LÁNI. JORÐIN ER NÚ ØLL YVIRTIKIN, EIN YVIRTØKA, IÐ ALS ONGAN TÝDNING HEVUR; MEN OKKUM TORVAR FRAMVEGIS HITT TÝDNINGARMESTA: EIN TÍÐARHØSKANDI LØGGÁVA, IÐ KANN VERA EITT LIÐ Í TEIMUM STØRBROYTINGUM, SUM FREMJAST SKULU

Landbúnaður okkara gevur lítið og einki aftur ímóti tí, hann veruliga kundi givið, um skil fekst á okkara búnaðarløggávu og farið varð undir tíðarhøskandi rakstur av landbúnaðinum. Hetta verður eitt takið at fara undir, og javnaðarflokkurin er til reiðar at fara til verka. Her er almikið at triva í, tí smáábøtur nytta einki — her má ein sonn kollvelting fara fram. Um hetta verður sagt í »Grundsjónarmiðum javnaðarflokksins«:

»Gjørd verður tíðarhøskandi landbúnaðarløggáva og framtíðarligi landbúnaðarpolitikkurin verður í øllum lagdur til rættis við tí endamáli, at Føroyar skulu gerast sjálvbjargnar við øllum búnaðarvørum, ið framleiðast kunnu í Føroyum.

Á samvinnugrundarlagi verður allur rakstur landbúnaðins at fara fram við nútímans amboðum og hentleikum, vælskipaðum søluog keypsmøðsløðum og serkønari arbeiðsorku og konari ráðgeving allastaðni, har hetta er neyðugt.«

Kross fyri LISTA

HON skriver

REINSING

Blóð. Kalt vatn er einasta ráð móti blóðblettum. Hevur ein fyrst brúkt heitt veitn, verður tað ógvuliga terfort at fáa blettin burtur. Í fall verður klæðið lagt í blot í einum enzyminnihaldandi vaskievni í koldum vatni, verður síðan vaskað eftir leiðbeining samsvarandi vaskievnið, ið brúkt verður.

* * *

GOÐ RÁÐ



Telefonin

Tá tygum vaska telefonina, ger hetta ikki við vanligum vatni, tí hon verður lættliga grá á liti. Tað er betri, um tygum blanda eitt sind ur av ammoniakk uppí, umleið ein tiggjundapart, í vatnið. Men turka hana væl aftaná.

* * *

¾ pund av mjøli verður rørt við ½ potti av róma, 10 eggjareyðum og smakkað til við sitrón og øðrum smakkevni, síðan verða eggjahvitarnir varliga blandaðir uppí stívt piskaðir). Hetta eigur at verða bakað beinan vegin á væl heitaðari eplaskivupannu. Borðreiðist við súltutoy og piskaðum róma.

Flokkurin

AÐALFUNDUR NORÐOYA JAVNAÐARFELAGS

Norðoya javnaðarfelag helt aðalfund í Klakksv. næstseinasta týskv. Sum vanligt vórðu frágreiðingar givnar av álitismonnum flokksins.

Formaðurin, Arni Samuelsen, greiddi frá virki felagsins í farna ári, og kundi hann har siga frá felagsins virksfúsasta ári, ið verið hevur.

Mangir vetrarfundir við dygdargóðum fyrilestrum, filmum og tilikum, ið eitt slíkt felag hevst at.

Kassameistari felagsins, Einar Waag, kundi leggja fram roknskap, ið ikki gav so stórt avlop; men sum hinvegin vísti, at væl var avvrikað. — Somuleiðis greiddi Einar Waag sum formaður í Klakksvíkar skúlanevnd frá ymiskum skúlaviðurskiftum.

Á fundinum var eisini formaður flokksins P. M. Dam, sum røddi um tey politisku viðurskiftini — serstakliga hina sterku javnaðarrorsluna — sum í dag telur meira enn 1200 organiseraðar limir.

Sum vituligt er, var stríðshugurin hin besti — og sjálvandi við fullum sigri í huga.

Á fundinum fór fram val av nevnd, tiltaksmonnum og roknskapargrannskoðarum.

Í nevnd vóru valdir:

Arne Samuelsen, arkitektur, formaður, Eskild Norðbúð, háskeri, næstformaður, Ragnar Samuelsen, sýslufulltrúi, skrivari, Einar Waag, bryggjari, kassameistari, Vilhelm Johannesen, postboð og Villi Sørensen, blaðstjóri.

Til tiltaksmenn vórðu valdir:

Havgrím Tróndheim, elektrikari og Tummas Tummasson, vrakaraeftirlitsmaður.

Til roknskapargrannskoðara varð valdur:

Michael Matras, kennari.

UPPSTILLINGARFUNDUR

Fyrsti uppstillingarfundur Norðoya javnaðarfelags var síðsta leygar kvøld í Klakksvík.

Somuleiðis er boðað frá, at annar uppstillingarfundur verður komandi leygardag.

Fólkaheimið Føroyar

Samfelagið átekur sær fullu ábyrgdina av grundbøting og uppdyrking av øllum dyrkbarum lendi í Føroyum!

BRÆV til skassin

Sosialurin.

Mær hevur verið fortalt, at fólka flokkurin á tingi eigur bara ein kredsvaldan mann aftaná seinasta løgtingsval.

Er hetta rætt, og hvar er hesin eini valdomisvaldi tingmaður fólkaflokksins valdur?

Veljari.

SVAR: Úrslitið av seinasta løgtingsvali hjá fólkaflokkinum var, at hann fekk 6 manns valdar; men bara ein av hesum var valdomisvaldur; tað var Sigfried Skale, borgarstjóri, sum kom inn valdomisvaldur, hóast hann stóð nr. 3 á fólkaflokkslistanum í Suðurstreymoy.

M ETA BARA BOMM!

O Tá tingmenn av og til
L **í Mjørkadali vitja NATO,**
A teir drekka ikki brennivín,
R eta bara bomm og sjókolátu!

KIKARIN

DUGA IKKI HØGV

Niðanfyri taka vit brot úr »Tingakrossi«, sum undan seinasta vali avmyndaði sjálvstýrisbróðurin tjóðveldisflokkin soleiðis:

»Burtur við tjóðveldisøsingini, buldrum og rópum, ið eru ekkó frá fólkaflokkskrópunum í kriggsárunum ... Soleiðis bera teir larmandi harrarnir seg at, sum ikki duga føroyskt høgv, teir sonevndu asfaltføroyingarnir.«

5 spurningar

1. Hvussu nógv fólk búði í Føroyum í 1860?
2. Hvussu høgur er Kunoyarnakkur?
3. Hvussu langt er til Noregs?
4. Hvussu høgt er Kirkjubøreyn?
5. Hvussu nógvir mans fórust undir krignum?

SVAR: 1. 9000 2. 820 3. 310 fj. 4. 350 m 5. 131.

BORT UT

* er tað ikki so av leið at vita,
* at allir flokkar, annaðhvørt
* teir ganga undir sambands-
* ella sjálvstýrisnavni, altíð eru
* til reiðar at selja bæði sam-
* band, fullveldi, loysing og
* sjálvstýri, bara tað ræður um
* at halda JAVNAÐARFLOKK
* IN, sosialistiska arbeiðara-
* flokkin, uttanfyri stjórnar-
* valdið!

Krossorð:



Tvørturum: 1) soldaði 7) mál 8) drykkur 10) skipastavir 11) etist 14) jarðamál (øvugt) 15) hóast 16) illa 18) ferst.

Niðureftir: 2) sót 3) hjálpti 4) ungi 5) vann 6) ivast 9) tviljóð 12) breyð 13) heimsfelag 17) tóni.

Veitst tú

AT deyðarevsing í Føroyum í krigstíð er sett í verk við vælsignilsi frá m. a. tveimum flokkum, sum í dag sita í landsstýrinum: fólkaflokkinum og sjálvstýrisflokkinum!

AT týskir læknar eru komnir eftir tí, at vissar hjartasjúkur eru sera vandamiklar fyri ferðslutrygdina; stórar kanningar eru í gongd, tí hjartaddeyðin við bilróðrið vindur nógv uppá seg.

AT amerikanskar kanningar siga frá, at skúlabørn nú á døgum dáma nógv betur at ganga í skúla enn børn gjørdu tað bara fyri 15 árum síðan.

AT bara ein av hvørjum 500 diamantum, ið funnir verða, hevur einki brek, og kann brúkast í allra dýrastu skreytlutum.

AT hvørt tiggjunda barn, sum varð føtt í London í fjør, varð føtt uttanfyri nakað hjúnarlag.

AT kamelurin kann goyma nóg mikið av vatni til triggdar daga forbrúk í oyðimørkini.

AT tað er ein sálarfrøðingur fyri hvørjar 18.000 íbúgvar í USA.

Rímsmiðjan

INNISPUNNIÐ TÓGV

Øll kenna orðatakið, at út skal koma innispunnið tógv, og tey flestu kenna nú eisini, hvussu eitt gott, gamalt orðatak kann misbrúkast.

Út skal koma
innispunnið tógv.
Hetta gamla orðatak
kenna nú so nógv.
Fyri teir, hetta søgdu,
so satt sum tað kann sigast,
men sjálvt eitt gamalt orðatak
kann til einkis sundur liðast.
Teir gomlu ofta brúktu tað,
og søgdu tað við tign,
men síðsta Føroya landsstýri
gjørdi tað til lygn!

VÆL SAGT

Tá eg havi fingið prógv fyri, at eitt fólk kann liva uttan breyð, tá vil eg trúgva, at franskmenn kunnu liva uttan heiður. (Napoleon)

* * *

Tað, sum verður givið av stoltleika og við reypi, er meira hugmóð enn gávumildni.

* * *

Vinskapur er ein sál, sum hevur fingið sær bústað í tveimum líkamum.

VERULEIKI

TAÐ ER VERULEIKI

AT tað vóru javnaðarmenn, sambandsmenn og sjálvstýrismenn, ið atkvøddu fyri og fingu samtykt, at móðurmálið í øllum lutum skal vera okkara høvuðsmál, meðan fólkaflokkurin atkvøddi ímóti fullu viðurkenning móðurmálsins.

hugskot

SVØRÐSLJØÐIÐ

Stættarmunurin er als ikki horvin enn — minni enn so, tíverri. Um hetta evni hevur hin navnframi danski fakfelagsleiðarin og næstformaður danska javnaðarflokksins, Hans Rasmussen m. a. sagt:

»— Tað er eingin klangur í svorðinum, tá afturhaldsblaðini skriva um verkføll og atgerðir, ið sett verða í verk av læknum, verkfrøðingum og øðrum frá teimum betri stættunum .....

* Tá talan er um
* teir bestaligu so-
* sialdemokratisku lønararbeið-
* arnar, sveiggja afturhaldsblað-
* ini dúgliga við revsingarsvørð-
* inum...«

BØRN

FJALL. Tá tú setur bókstavirnar niðanfyri annarleiðis saman, fært tú navnið á einum fjalli í Streymoy:

IEOPSPKNN

* * *

KLOKKUGÁTA

1— 3 = epli
3— 4 = skipastavir
1— 7 = 1 arbeiði
8—11 = sipar
10—12 = heiður

* * *

LOYNDARMÁL:

Tá ið tú hevur funnið orðini niður eftir, fært tú á 2. og 4. reglu tvey orð, ið merkja hitt sama:

1	2	3	4	5	6	7

1. hvøss 2. pota 3. ringari 4. træpetti 5. lesa 6. onkur 7. eins bókstavir.

* * *

TRÍKANTURIN:



1 = 1000
2 = á
3 = prikk
4 = litur
5 = ilæti

— Vist eri eg full av lygn; men tað eru onnur, ið haya fylt meg!

* * *

Skotin.

So var tað skotin, ið datt á sjógv og varð bjargaður av einum smádreingi. Uppaftur komin sigur skotin:

— Góði, far nú heim til mammu og bið hana geva tær 50 oyru til ein ís afturfyri.

* * *

Festtalur gera ið hvussu er ta nyttu, at ein fær slokt tostan!

* * *

Gesturin: Hví vaktu tygum meg ikki klokkan sjey, sum eg bað tygum?

Verturin: Tað var ógjørligt, tygum komu ikki tilhús fyrr enn klokkan 8.

* * *

Grundin til at kvinnur binda er, at tú hava tær okkurt at hugsa um meðan tær tosa!